# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Susan Skaaning farin



Susan Skaaning doyði brádliga hin 9. februar eftir stutta sjúkralegu, bert 61 ára gomul.

Saman við Torben og børnunum búði Susan ein triðing av lívi sínum í Føroyum, 1972-1991. Hetta hevur havt so stóran ávirkan á familjuna, at tvey av teimum trimum børnunum nú búgva í Føroyum.

Susan arbeiddi sum assistentur á Djóradeildina á Føroya Náttúrugripasavni í árunum1983-1991 í einum sera fjølbroyttum og virknum tíðarskeiði. Í stóru grindakanningunum frá 1986 til 1988 luttók ikki bara Susan í innsavningini av sýnum kring landið, men øll familjan var sum oftast eisini við. Her lærdu vit eina tætt samansjóðaða familju at kenna, ið stóð saman um alt, ið lívið nú hevði at bjóða teimum.

Susan var eitt ótrúliga kreativt menniskja, full av lívsgleði og orku, og øll kring hana nutu gott av hesum, bæði heima og í arbeiðinum. Hon hevði eina stóra vitan, ikki bara um Føroyar, men um alt møguligt, og hon dugdi at brúka hesa vitan í gerandisdegnum. Á einum lítlum savni við fáum starvfólkum, verður enn meira brúk fyri fólk við víðfevndari vitan og gávum. Susan oysti burturúr við gleði, og vit nutu øll burturav. Hon var ein megnar kvinna.

Súsan var áhugað í nógvum ymiskum, og hon var heil, har hon var. Tá familjan flutti til Føroya, var tað tí so natúrligt og einfalt, at hon fór at læra sum mest um hetta nýggja heimland teirra. Einaferð segði hon, at hon tey fyrstu 2 árini bara lurtaði. Seinni fór hon á skeið á Fróðskaparsetrinum fyri at vita meira um føroyska søgu og mentan.

Hennara stóra vitan og livandi áhugi fyri Føroyum og føroyskum viðurskiftum, hennara opna og vinnandi medferð gjørdi hana væl skikkaða til ferðaleiðarastarvið. Við stóru almennu vitanini um verðina uttanfyri Føroyar, varð hon ein av bestu føroysku ferðaleiðarunum.

Ferðavinnan varð eitt natúrligt ítriv hjá henni, og hon varð limur í Felagnum Tórshavn líka frá byrjan og var í nógv ár nevndarlimur.

Tá hon við sorgblídni flutti av landinum, helt hon fram at brúka sín kreativitet til at gera sera vakrar minnislutir úr Føroyum, og tá hon og Torben fluttu aftur til Danmarkar úr Týsklandi, vendi hon aftur til ferðavinnuna og arbeiddi eina tíð á Handels- og Søfartsmuseet á Kronborg.

Susan hevði nógvar vinir í Føroyum, og vit sóu øll fram til, at hon fór at koma oftari at vitja, nú hon hevði børn og ommubørn í Føroyum. Susan gleddi seg eisini nógv til at síggja tey bæði ommubørnini, sum hon skuldi fáa her til várs og til barnadópar teirra her í Føroyum. Men so skuldi ikki verða, og vit fara øll at sakna hana.

Okkara samkensla fer til Torben, børnini við makum og ommubørnini, og við hesum fátøku orðum lýsa vit frið um minnið um Susan Skaaning.

**Dorete Bloch**
**Føroya Náttúrugripasavn**

**Ingigerð á Trøðni**
**Felagið Tórshavn/**
**Kunningarstovan**

## Petur Djurhuus 90 ár



Mánadagin 16. februar fylti Hans Peter Djurhuus í Havn ella Petur Djurhuus, sum hann verður nevndur, 90 ár. Fólk kring landið munnu komast við Petur, sum í nógv ár var skipasýnismaður og í arbeiðsørindum ferðaðist kring landið. Føðingardagin helt hann sunnudagin saman við familjuni. Ikki kann sigast annað, enn at familjan er stór, tí gestirnir í 90 ára føðingardegnum knappaðust um teir hundrað.

Petur er ættaður av Nesi í Vági. Foreldrini vóru Louisa og Hans Djurhuus. Tey áttu átta børn: Oscar, Emma, Sigrid, Petur, Helena, Håkon, Osla og Ruth. Oscar var skipsførari, og hann førdi í nógv ár Dronning Alexandrine. Umframt hann búsettust Emma, Sigrid og Helena niðri. Håkon búði í Vági, Osla í Havn og Ruth í Vági. Eftir á lívi eru Petur, Osla og Ruth.

Petur fór blaðungur til skips við City, sum Dias á Heyggi átti. Tað var har umborð, at hann fekk andaligu sannføringina, sum síðani hevur verið grundarlagið, sum Petur hevur hvílt á.

Hugurin stóð til bókina, men tað vóru ikki so góðar umstøður hjá familjum í tríati árunum at lata fleiri børn fara burtur at lesa. Men hugurin og viljin vóru til tað, og tað eydnaðist Peturi at læra og lesa. Fyrst lærdi hann til skipstimbrara á bedingini í Vági. Tá ið tað ikki var so nógv arbeiði á bedingini, smíðaðu og umvældu teir hús. Tá ið lærutíðin var liðug, fór Petur í 1938 til Danmarkar at læra til skipsverkfrøðing. Hetta var í Helsingør, har hann var øll krígsárini. Petur var fyrsti føroyingurin, ið leyk prógv sum skipsverkfrøðingur.

Eftir kríggið flutti Petur aftur til Vágs, har hann gjørdist bedingsmeistari. Í 1957 flutti hann til Havnar, tí hann hevði fingið starv hjá Skipasýninum, og hann var í tí starvinum, inntil hann sum 63 ára gamalur varð pensioneraður. Petur sýnaði eisini fyri Realin og Landsstýrið.

Í fríløtunum hevur Peturi dámað so sera væl at floti. Hann hevur verið nógv í Fjørðinum, og honum dámar væl at práta um tað, sum hoyrir sjólívinum til. Petur hevur lisið eina rúgvu í bundnum og óbundnum máli, og serliga Søren Kierkegaard hevur hann verið nógv upptikin av. At hendurnar hava verið góðar hevur sæst aftur á so mangan hátt. Hann hevur evnað brúkslutir og prýðislutir burturúr træi og eitt nú kopari, og hann hevur verið hentur hjá børnunum, tá ið okkurt hevur verið at gjørt bæði innandura og uttandura.

Petur var giftur við Elly Dam úr Havn. Hon doyði fyri trimum árum síðani. Børnini eru Jens Christian, Karin, Lis og Eyðvør. Genturnar búgva í Havnini, og Jens Christian býr í Nesvík.



*Umleið hundrað fólk vóru í føðingardag hjá Petur Djurhuus, sum varð hildin sunnudagin 15. februar. Her er Petur saman við javnaldranum og grannanum Hansemann Thomsen*
*Mynd: Jan Müller*



*Jógvan Mørkøre av Eiði heilsar upp á føðingardagsbarnið*
*Mynd: Jan Müller*



*Petur saman við yngstu dóttrini, Eyðvør á Váli*
*Mynd: Jan Müller*

**VARPIÐ**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Holgar Poulsen 70 ár



Mánadagin fylti Holgar Poulsen í Klaksvík 70 ár. Hann er sonur Cathrinu Oluffu Heinesen, kallað Dinna, av Viðareiði og Carl Julius Poulsen úr Masnedsund í Vordingborg Kommunu á Sælandi. Hann er giftur við Brynhild Klettskarð úr Haraldssundi. Tey búgva í Klaksvík og eiga tvey børn, Bjørg og Beinir.

Sum ungur var Holgar sjómaður og sigldi serliga við norskum línuskipum. Í seinnu helvt av fimtiárunum legðist hann uppi og fekk sær Sjóklædnavirki. Hann byrjaði í smáum, men tá nøkur ár vóru liðin, bygdi hann stór sethús og virkishús á Brekku í Klaksvík. Tá mest arbeiði var á virkinum, mundu eini 15 fólk arbeiða har.

Ta einu tíðina framleiddu tey heilt nógvar kovboybuksur, men góvust við hesum, tá kappingin gjørdist ov hørð við annað virki av sama slag í Føroyum.

Sjóklædnavirkið er framvegis í gongd. Tey framleiða sera væl umtókt oljuklæðir, bæði løtt og tunn og tjúkk og heit, heilar blusur og opnar. Eisini gera tey bjálvar at hava innan undir oljublusuni í kulda. Haraftrat gera tey útsynningar (sydvestar) og ymist annað. Niðara hædd á Sjóklædnavirkinum hýsir Verkstaðnum á Brekku, sum er verkstaður fyri evnaveik, har tey gera plattar og ymsar brúkslutir.

Tað man vera óneyðugt at siga, at Sjóklædnavirkið eisini gjørdi tær sokallaðu tjóðveldisblusurnar, tí tjóðveldismaður er Holgar av teimum fremstu. Hann hevur verið sera virkin í Norðoya Tjóðveldisfelag, og valkvøldini hýsti hann mangan teimum, sum komu saman at fylgja við valúrslitunum.

Holgar hevur ikki slitið alt samband við Viðareiði, haðani mamman var ættað. Hann hevur havt nakrar seyðir har norðuri, og Brynhild og hann eiga summarhús eysturi í Eiðsvík, og har hava tey verið nógv.

Tey seinastu árini hevur Holgar verið minnisveikur, og tí er tað dóttirin Bjørg, sum stendur fyri arbeiðinum á Sjóklædnavirkinum. Beinir býr í Danmark og arbeiðir sum skipsmeklari.




## Tøkk



Øllum tykkum sum gjørdu hjúnabandsdag okkara 26. juli 2003 so minnisríkan og ógloymandi, vilja vit veita eina hjartans tøkk. Takk fyri blómur, gávur og fjarrit.

**Heidi og Kurt Fróði**

### Dagurin

**18. februar. Concordia**, deyð umleið ár 250. Lítið kend halgikona í fornkirkjuni.

## 50.000 krónur til Føroya Symfoniorkestur



*Harley Joensen frá Lions Club Eysturoy handar Alex Sólstein, kassameistara í Føroya Symfoniorkestri, kekkin áljóðandi 50.000 krónur*

**Føroya Symfoniorkestur, sum hevði sína 10. nýggjárskonsert herfyri, hevur gjøgnum árini fingið nógvan stuðul ymsastaðni frá í landinum**

Ein av teimum heilt stóru stuðlunum hjá orkestrinum tvey tey seinastu árini er Lions Club Eysturoy. Tvær ferðir hevur orkestrið fingið ein kekk áljóðandi 50.000 krónur til raksturin av orkestrinum frá teimum, og eru tey avbera takksom fyri tað.

Eisini hava onnur stuðlað orkestrinum á ymiskan hátt, sum orkestrið takkar fyri.

Endmálið við gávuni hjá Lions Club Eysturoy var, at tey fegin vildu ganga á odda við at stuðla Symfoniorkestrinum, so at virksemið kann halda fram. Tey meta, at tað vera av størsta týdningi, at eitt lítið land sum Føroyar eisini hava eitt Symfoniorkestur.

Vælvitandi, at tað kostar nógv at hava eitt virkið symfoniorkestur, má Lions sigast at ganga á odda og vísa øðrum felagsskapum, vinnulívinum og fyritøkum á, at um Symfoniorkestrinum skal vera lívi lagað, so er neyðugt at tað privata, saman við tí almenna stuðlar orkestrinum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma og langomma

**Edith Hansen**
**fødd Simonsen**

andaðist leygardagin 14. februar 2004, 77 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Aksel**